**AVGERÐ**

**Tikin 30. september 2022**

**Yvirkærunevndin hjá Fótbóltssambandi Føroya**

**í máli 3/2022**

**fótbóltsfeløgini, NSÍ, AB og 07 Vestur**

**móti**

**fótbóltsfeløgunum, B36 og B68**

Andrass Holm Arge, formaður, Høgni J. Høgnesen, næstformaður og Jens Erik Magnussen hava viðgjørt kæruna.

**KÆRAN**

Tann 16. september 2022 tók Aganevndin hjá Fótbóltssambandi Føroya avgerð í einum máli, ið snúi seg um, at B36 hevði brúkt ungan fótbóltsspælara, ið er 17 ára gamal, í einum dysti í Gundadali millum B36 og B68 tann 4. september 2022.

Í telduposti 5. september 2022 gjørdi B68 FSF vart við, at ungi leikarin, dagin fyri dystin móti B68, 3. september 2022, hevði spælt tveir dystir, ávikavist við 1. deild hjá B36 og U-17 liðnum hjá B36, og tí ikki hevði loyvi at spæla við B36 í dystinum móti B68 tann 4. september 2022., sbr. § 8, stk. 3 sbr. stk. 4 í Kappingarreglunum.

B36 vann dystin 3 – 1, men Aganevndin gav B68 viðhald í kæruni og gjørdi av at døma B36 at tapa dystin við málmuninum 3-0 , ið hevði við sær, at tey trý stigini vórðu flutt til B68.

Við skrivi 21. september 2022 hava fótbólstfeløgini NSÍ, AB og 07 Vestur saman eisini kært avgerðina hjá Aganevndini til Yvirkæunevndina.

**KÆRURÆTTUR KÆRARANNA**

*Málskrav kæraranna*

Kærararnir gera galdandi, at teir hava rætt at kæra avgerðina hjá Aganevndini til Yvirkærunevndina.

*Grundgevingar kæraranna fyri málskravinum*

Rættin at kæra byggja kærarnir á, at vísandi til:

- at tað einans vóru 5 umfør eftir at spæla í Betri deildini, tá Aganevndin kom við sínum úrskurði tann 16. september,
- at B68, NSÍ, AB og 07 Vestur vóru rættiliga jøvn í stigum og
- at øll fýra feløgini eru í vanda fyri at flyta niður í 1. deild

vórðu NSÍ, AB og 07 Vestur beinleiðis rakt av avgerðini hjá Aganevndini, sum hevði við sær, at B68 fekk 3 stig fyri dystin, ið B68 upprunaliga hevði tapt fyri B36 tann 4. september 2022. *NSÍ, AB, og 07 Vestur hava sostatt ein serstakan og rættarligan áhuga í málinum og harvið eisini rætt at kæra avgerðina.*

**GRUNDGEVINGAR OG AVGERÐ YVIRKÆRUNEVNDARINNAR**

Í grein 13 í Agareglugerðini er ásett:
*Kærurætt hava feløg og einstaklingar, sum verða beinleiðis raktir av eini avgerð og onnur sum hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum.*

Kærararnir stuðla sítt sjónarmið um, at teir hava rætt at kæra avgerðina á, at teir eru beinleiðis raktir av avgerðini hjá Aganevndini og hava sostatt ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum. Yvirkærunevndin metir, at avgerðin hjá Aganevndini rakti beinleiðis partarnar í málinum, B36 og B68, men at kærararnir kunnu ikki sigast at vera beinleiðis raktir av avgerðini hjá Aganevndini. Kærunevndin metir tí, at kærararnir eftir hesum ikki kærurætt.

Til sjónarmiðið um, at kærararnir hava rætt at kæra, hóast teir ikki eru beinleiðis raktir av avgerðini, men hava ein serstakan og konkretan rættarligan áhuga í málinum, skal viðmerkjast, at Yvirkærunevndin heldur, at talan er um eina so generella fylgju av avgerðini, at kærararnir heldur ikki eftir hesum hava rætt at kæra, hóast plássið, ið feløgini hava á stigatalvuni, og einans fimm dystir vóru eftir at spæla.

Yvirkærunevndin metir, at feløgnini NSÍ, AB og 07 Vestur verða ikki rakt beinleiðis ella óbeinleiðis við slíkari styrki og megi, at hetta elvir til, at hesi feløg verða partur í málinum, og harvið fáa kærurætt, sambært partshugtakinum. Hesi feløg stríðast ájavnt í botnstríðnum, nú 4 umfør eru eftir av kappingarárinum, og stríðið er ájavnt tað sama undan avgerðini hjá Aganevndini, tó so at B68 sum beinleiðis rakt felag fær ein fyrimun.

**TÍ VERÐUR AVGJØRT:**

Kæran frá 07 Vestur, Argja Bóltfelag og NSÍ, dagfest 21. september 2022 verður burturvíst.

Andrass Holm Arge, løgfr. og formaður

Høgni J. Høgnesen, løgfr. og næstform.

Jens Erik Magnussen, nevndarlimur